

# Her er lív innanveggja

*Ólavur í Beiti hevur fingið loyvi frá Sørvágs Kommunu at brúka gamla skúla í Sørvági til atelier. Hann trívist væl og er takksamur fyri ta vælvild, kommunan vísti honum*
*Mynd: Edvard Joensen*

Gamli skúlin í Sørvági er vorðin atelier. Sørvingur, sum hevur verið uttanlands og nomið kunnleika um málningalist, er heimafturkomin og hevur frá bygdarráðnum fingið loyvi at brúka skúlan til atelier

LIST
*Edvard Joensen*

Sørvági: Í gamla skúla í Sørvagi er aftur komið lív. Eitt er, at skúlin er vorðin málaður uttan. Men innan verður eisini málað. Málað fínt. List, skilir lesarin.

Sørvingur, sum annars er kendur sum skrivandi maður, hevur tikið pensil í hond og er farin at mála. Tó ikki burturav, tí framvegis eru bøkurnar frammarlaga í huganum.

Ólavur í Beiti hevur verið í Danmark og nomið sær kunnleika um málningalistina. Hjá listamanni í Norðurjútlandi, greiðir hann frá.

Fyri at kunna fáa nakað burtur úr málingini, er neyðugt við góðum arbeiðshølum.

Tey kundu nokk fáast í Danmark, men tað kostaði ikki heilt einki, so hugsað varð um at fáa okkurt heima á landi og so royna seg í heimliga umhvørvinum.

– Tað passar eisini betri til mín, heldur Ólavur. Tí eg máli landsløg og slíkt, sum eg síggi, og í Danmark er einki landslag. Har er alt líka. Slætt. Øðrvísi er í Føroyum, har einki líkist øðrum, og tú alla tíðina fært nýggjar vinklar og nýtt ljós at arbeiða við.



*Ólavi dámar væl litir, sum ikki beinanveg loypa á fólk. Føroyar eru ofta soleiðis at síggja, sigur hann*
*Mynd: Edvard Joensen*



*Kortini eru myndir við sterkum litum, tí soleiðis síggja vit eisini landið av og á*
*Mynd: Edvard Joensen*

## Vælvild

Ólavur í Beiti er fegin um ta vælvild, honum er víst frá kommunalari síðu, sum hann tekur til.

Tá hann setti seg í samband við Sørvágs Kommunu við fyrispurningi um at fáa gamla skúlan í Sørvági til arbeiðshøli, var leyst og liðugt beinanveg, greiðir hann frá. Og tað er hann bygdarráðnum ógvuliga takksamur fyri, sigur Ólavur.

Hann hevur nú allan skúlan fyri seg sjálvan. Heldur til í niðaru hæddini, har alt er gjørt til eitt rúm.

Ljóst og rúmligt er inni. Eitt staffeli stendur í tí partinum, har innara stovan var. Málningar hanga á veggjunum. Summir lidnir, aðrir ikki. Hann veit ikki rættiliga. Ilt at siga. Kanska verður onkur strika gjørd afturat.

Hann tekur eina mynd niður av vegginum. Heldur, at hon er ikki heilt liðug. Kundi verið, at hon skal hava okkurt afturat. Og skal nú ein fotomynd takast, so er best, at hon verður tikin, meðan maðurin arbeiðir, heldur hann.

Og soleiðis fær hetta grøna løriftið nakrar svartar strikur her og har. Nýblandaða máling, smurda upp á við einum stívum pensli. Tað gresjar í løriftinum, tá strokið verður eftir.

Og knappliga hava vit eina heilt aðra mynd. Køld er hon. Gamaní. Grøn luft er køld. Men so er ein strika, sum kann líkjast havsbrúnni, komin har úti, Og nærri okkum er sjóvarkletturin og kanska onkur myrkur hamarsendi uppi á landi eisini.

Soleiðis fekk myndin aðra útsjónd, enn listamaðurin kanska upprunaliga hevði ætlað, tí hann vil vera fyrikomandi og lata myndamannin fáa hesa fotomyndina av sær.

## Onnur meta

Ólavur í Beiti sigur, at hann málar tað, hann sær. Hvussu tað annars er, letur hann onnur meta um.

Og tað kunnu fólk nær sum helst sleppa at gera, sigur hann. Fólk eru vælkomin inn á gólvið, meðan hann arbeiðir. Kunnu síggja, hvussu farið verður fram, og skoða tað, sum á veggjunum hongur.

Hann leggur høvdið eitt sindur á skák. Blundar við øðrum eyganum og smílist eitt sindur.

–Hava tey hug at keypa ein málning, eri eg ikki heilt óvilligur til at lata hann frá mær, heldur hann.

Hann hevur ikki hug at verða lagdur undir at eftirgera tað, onnur hava málað, sigur hann. So hann má royna at finna sín egna stíl, hvussu tað so skal gerast og eydnast?

Men hann leggur einki í at brúka so øgiliga nógvar litir, sum nú ofta verður gjørt, hóast hann kortini hevur onkran litfagran málning.

Betri dámar honum at finna dýpið og ljósið. Og tað kann best gerast við at mála alt í einum, sigur hann. Ikki við at leggja litirnar í lagi oman á lag.

## Eisini bøkur

Hóast Ólavur í Beiti heldur man vera kendur millum fólk sum skrivandi enn sum málandi maður, eru bøkurnar í løtuni farnar eitt sindur afturum til frama fyri málningalistina.

Tó hevur hann ikki heilt slept bókliga virkinum kortini. Men beint nú eru tað annara verk, ið standa fyri.

Ólavur greiðir frá, at hann saman við bygdarmanninum Sonna Jacobsen arbeiðir við at geva út verk hjá øðrum bygdarmanni, Einari Petersen.

– Einar er farin í rúmligari skaldaheim enn hendan, vit ganga og tvassa í, og ætlanin er nú at savna hansara samlaðu verk, greiðir Ólavur frá.

Einar Petersen var í ferð við at skriva eina krimisøgu, tá hann doyði. Hon var ikki liðug, men Sonni Petersen hevur nú gjørt hana lidna. Hon verður millum tað, sum ætlanin er at geva út. Eisini onkur av hansara fyrru krimisøgum, sum hevur verið útseld, verður aftur at síggja í hesum verkinum, sigur Ólavur í Beiti, sum vónar, at útgávan kemur fyri jól.






## TÓRÐUR MIKKELSEN · 46 ÁR · TÍÐINDAMAÐUR

Lýs teg sjálvan við trimum orðum.
Óruddiligur...nei bíða nú...tað skal ikki verða for... Eg haldi eg eri nokk so samvitskufullur og so er tað hvat tað triðja skal verða... impulsivur

Hvat orð nýtir tú oftast?
Tað sum eg havi brúkt øgiliga nógv í seinastuni er "í fínasta lagi"... ja kanska havi eg brúkt tað ov nógv

Hvørjum hyggur tú at hjá hinum kyninum?
Ja eygunum hyggur tú væl altíð eftir, tí tað er væl tað sum er mest sigandi hjá fólki ella hvat?

Hvussu langa tíð nýtir tú at gera teg kláran um morgunin?
Tað er øgiliga ymiskt. Tað má vera úr hálvum tíma til ein tíma og fimm minuttir

Hvat stressar teg?
Smáligheit ella fólk sum ganga í smáum skóm. Tey eru rættiliga stressandi og ómøgulig at fáast við

Hvat gleðir teg?
Ja, tað er tað klassiska við, tá familjan hevur tað gott... Annars tað at vera saman við positivum fólkum

Nær feldi tú seinast eitt tár?
Tað var eitt kvøldi herfyri, tá eg hugdi at eini sending í sjónvarpinum. Eg minnist ikki rættiliga, nær tað var. Eg havi faktiskt nokk so lætt at verða ávirkaður.

Nær smakkaði tú tær seinast á?
Hahaha, ja tað er... Hugsar tú um brennivín? Eg havi ongantíð smakkað brennivín, og eg veit faktiskt ikki, hvussu tað smakkar. Seinast, eg var í vertskapi, var tá Sjónvarpið helt 20 ára dagin, og tað var rættiliga hugnaligt. Hóast eg ikki drekki, so stuttleiki eg mær í vertskapi

Um tú vart landsstýrisfólk, hvat málsøkið vildi tú so umsitið?
Eg hevði vilja umsitið Innlendismál hjá Jógvan við Keldu, so vit høvdu fingið skil á hendan útlendingapolitikkin. Vit mugu broyta tónan, tí tónin í løtuni er óneyðugur.

Hvat er besta uppfinning?
Tað má verða ljósperan

Nær flutti tú heimanifrá?
Ja, nær gjørdi eg tað? Tað má verða fyrst í tjúgunum, 21-22 har á leið, tá eg einsamallur flutti til Havnar

Hvat kostar Sitrónuppvask frá Kemilux í Miklagarði ?
Haha.. Uha frá Kemilux? Eg skjóti upp á 17 krónur.
Nix Tórur, hann kostar einans 10.95 krónur

Í farnu viku vórðu Joachim og Alexandra sundurlisin. Hvussu leingi hava tey verið gift?
Var tað ikki í níggju ár?
Jú, Tórður, rætt hevur tú. Tey vóru gift í átta ár og tíggju mánaðir

Títt besta praktiska ráð...
Ja, hvat skal tað verða? Nú dámar mær so væl rísvelling. Eg vildi sagt, at tá tú kókur rísvelling, mást ongantíð lata tað brenna í botnin, tí so smakkar tað av hundanum til.

Hvør skal næstu ferð setast í bláa stólin?
Eg hugsaði um eitt konufólk til næstu ferð. Tað skal verða Marjun Kalsø.